# Viðtøkur

# fyri

# Føroyagrunnurin

§ 1

Navn grunsins er Føroyagrunnurin frá 1971. Heimstaður grunsins er Klaksvík.

Grunnurin er vinnurekandi sambært "anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde", nr. 247 frá 2. mai 1993.

Grunnurin varð upprunaliga stovnaður av Føroya Landsstýri og danska tjóðbankanum, og eru upprunaliga viðtøkur grunsins kunngjørdar í Føroya Kunngerðasavni, sum kunngerð nr. 2 frá 27. januar 1972.

§ 2

Stovnsfæ grunsins er kr. 20.000.000, sum eru inngoldnar í virðum.

§ 3

Endamál grunsins er:

a) At eiga partapening í JFK P/f

b) Í tann mun fíggjarligu umstøður grunsins loyva tí at veita stuðul sambært § 4 í viðtøkunum

c) Harumframt kann grunnurin seta á stovn og eiga vinnurekandi partafeløg

§ 4

Tað nettoavlop eftir rakstrarútreiðslur, sum peningur stovnsins kastar av sær, kann verða nýtt til:

a) Vinnuútbúgving hjá ungum føroyingum til stuðul og/ella til ídnaðarroyndir innan fiskivinnu, handverk og ídnað, marknaðarkanningar og slíkt

b) Nevndin kann gera hóskandi avleggingar til øking av stovnsfæi grunsins

Nevnd grunsins ásetir býtið av nýtsluni av avlopinum millum a) og b)

Peningurin kann bert verða nýttur til hesi endamál samsvarandi reglunum í § 41 í lóg um vinnurekandi grunnar.

§ 5

Styrkur kann bert veitast eftir umsókn. Stýri grunsins tekur avgerð um, hvør skal fáa veitingar og ger somuleiðis av støddina og treytirnar fyri hesum. Avgerðir eru endaligar.

Játtaðar veitingar kunnu, so leingi tær ikki eru útgoldnar, ikki avhendast, veðsetast ella verða fyri rættarsókn av nøkrum slag.

§ 6

Leiðsla grunsins er eitt stýri við 4 limum, sum skulu vera búsitandi í Føroyum. Stýrislimirnir verða útnevndir fyri 4 ár.

Tríggir av stýrislimunum verða útnevndir av Føroya landsstýri tó soleiðis, at ein av hesum verður útnevndur eftir tilmæli frá Klaksvíkar kommunu, sum skal innstilla minst trý evni. Fjórði stýrislimurin verður útnevndur av Klaksvíkar kommunu eftir tilmæli frá teimum verkafeløgum, sum umboða tey starvsettu í JFK konsernini. Hesin stýrislimurin skal eisini verða starvsettir í konsernini.

Í millum teir fýra stýrislimirnar velur landsstýrið formannin.

§ 7

Til samtyktir stýrisins krevst vanligur atkvøðumeiriluti. Stendur á jøvnum er atkvøða formansins avgerandi.

Broytingar í viðtøkunum hjá dótturfeløgum grunsins kunnu ikki gerast uttan góðkenning Føroya landsstýrisins.

§ 8

Bindandi fyri grunnin er undirskrift hjá formanni og einum stýrislimi í felag ella trimum stýrislimum í felag.

§ 9

Roknskaparár grunsins er álmanakkaárið.

Roknskapur grunsins skal grannskoðast av einum av stýrinum valdum grannskoðara, ið skal vera løggildur.

Stýrið leggur árliga frágreiðing og roknskap fyri landsstýrið.

§ 10

Verður grunnurin avtikin, verður nettoognin nýtt samsvarandi avgerð frá stýrinum og tess innstilling til grunsmyndugleikan, soleiðis at ognin í størst møguligan mun verður nýtt í samsvari við endamálsgrein grunsins.

§ 11

Broytingar i hesum viðtøkum kunnu bert fara fram við loyvi frá grunsmyndugleikanum eftir innstilling frá stýrinum og við samtykki frá Løgmálaráðnum. Verður grunnurin avtikin, krevst somuleiðis innstilling landsstýrisins.

§ 12

Hesar viðtøkur eru samtyktar í februar 2001, men broyttar í 2013, tá valskeiðið er lækkað úr 8 árum til 4 ár, tó so, at skiftistíðin er 6 ár fyri teir limir, sum standa fyri vali í 2012.

Soleiðis samtykt á fundi tann 28/6 2013

Stýrið:

Leif Abrahamsen

Jóhanna á Bergi

Jóhan A. Reyðberg

Hergerð Joensen

Soleiðis samtykt á fundi tann 28/6 2013

Fundarstjóri

Niels Winther Poulsen